# Vænta svimjihyl í Nólsoy um 5 ár

**Hóast tann trettanda ovastevnan er farin aftur um bak, er tann ætlaði svimjihylurin í Nólsoy ikki bygdur enn. Í Nólsoy ásanna tey, at inntøkurnar fra stevnuni ikki eru nóg mikið til at byggja svimjihyl, og at eitt umfatandi pappírsarbeiði, har stuðul skal útvegast, nú skal gerast. – Øll verkætlanin skal endurskoðast, sigur Jákup av Skarði, limur í fyrireikingarnevndini**



*Jákup av Skarði rósar familjuni hjá Ova fyri at hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at hava umvælt bátin hjá Ova. Nógv fólk nýttu høvið at hyggja eftir Dianu Victoriu um vikuskiftið*

NÓLSOY
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið varð tann trettanda ovastevnan hildin í Nólsoy til minnis um Ova Joensen og bragd hansara – róðurin úr Nólsoy til Keypmannahavnar í 1986.

Eftir bragdið lovaði Ovi Joensen børnunum í Nólsoy ein svimjihyl, og síðani hevur verið arbeitt við hesi ætlan. M.a. hevur ovastevnan verið ætlað sum ein partur av innsavningini til svimjihylin.

Jákup av Skarði, formaður í stevnunevndini, ásannaði tó í Útvarpinum um vikuskiftið, at inntøkurnar frá stevnuni neyvan vóru nóg mikið til at fíggja ein svimjihyl, og tí er neyðugt at ganga nýggjar leiðir, um málið hjá Ova skal røkkast.

Jákup av Skarði sigur við Sosialin, at ein umsókn hevur ligið í Mentamálaráðnum frá teirri tíðini, tá tað var vanligt at landið rindaði helvtina av slíkum verkætlanum, sum hann tekur til, men enn er einki rættiligt svar komið haðani.

Jákup av Skarði sigur seg tí vóna, at tað eydnast teimum at umskipa ætlanirnar at byggja svimjihyl, og sjálvur sigur hann seg einki hava ímóti at gerast formaður í nevndini fyri tann ætlaða svimjihylin, sum hann higartil hevur verið limur í.

### Endurskoða ætlanina

Jákup av Skarði metir, at svimjihylurin kemur at kosta einar 6-8 milliónir, men væntandi verður projektið endurskoðað í heyst. Jákup av Skarði sigur sge vænta, at svimjihylurin stendur liðugt bygdur um fimm ár, men av tí at nógvir faktorar spæla inn, er neyðugt at hyggja eftir ætlanunum eina ferð afturat. M.a. hevur verið frammi, at Nólsoyggin skal verða grøn oyggj, og hetta kemur uttan iva at seta sín dám á ætlanirnar, tá svimjihylur skal byggjast.

Harafturat var upp á tal í teimum upprunaligu tekningunum, at serbygdi báturin hjá Ova, Diana Victoria, skuldi standa inni í sjálvari høllini, har svimjihylurin skal verða, men nú eru røddir frammi um, at kanska er betri at byggja eitt neyst til bátin, sum skal vera framsýningarhøli. Í hesum sambandi vil Jákup av Skarði geva familjuni hjá Ova eitt herðaklapp fyri at hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at hava umvælt bátin, og Jákup av Skarði greiðir frá, at nógv fólk nýttu høvið at hyggja eftir Dianu Victoriu um vikuskiftið.

### Kommunan ikki við

Spurdur, um tey ikki ætla at biðja Tórshavnar kommunu um fíggjarliga hjálp, nú Nólsoy er vorðin partur av kommuni, sigur Jákup av Skarði, at hetta ikki er ætlanin í løtuni.

Ein av orsøkunum til hetta er stoltleiki, sum Jákup av Skarði málber seg. Men hann leggur eisini afturat, at tað verður torført at fáa ymsar grunnar at veita stuðul, um kommunan er við, og tí hava tey í fyrstu syftu ikki valt hesa loysnina.

Tað, sum nú skal til, er eitt umfatandi pappírsarbeiði. sigur Jákup av Skarði, sum leggur dent á, at tað er týdningarmikið at skriva umsóknir á ein slíkan hátt, at peningur verður latin. Hann sigur, at tey ikki ætla at biðja sakførarar hjálpa teimum við umsóknum, tí hetta skal peningur frá ovastevnuni, men tey hava áður sjálv roynt seg við at søkt pening frá eitt nú grunni hjá A. P. Møller – tó uttan nakað úrslit higartil.

### Hugni fyri bygdarfólkið

Jákup av Skarði metir, at higartil er øll orkan farin til at skipa fyri ovastevnuni, og tí er neyðugt at eftirmeta fyrireikingararbeiðið til svimjihylin, og at farið verður undir hetta í næstum.

Sunnukvøldið verður ein eftirmeting av sjálvari stevnuni, og leygardagin 26. august verður skipað fyri sokallaðum "hugnaligum degi" fyri bygdarfólkið í Nólsoy, tí ovastevnan var fyri gestirnar, sum Jákup av Skarði tekur til, og hetta verður fólkið í bygdini.

Sostatt er líkt til, at inntøkurnar frá ovastevnuni í framtíðini heldur verður at roknað sum eitt slag av ískoyti til raksturin av tí ætlaða svimjihylurin. Longu í heyst verður byrjað at fyrireika ta næstu ovastevnuna, sum skal verða upp aftur betri enn tann í ár, og ovastevnan skal vera endin á teimum árligu summarstevnunum, leggur formaðurin í stevnunevndini afturat.

## John og Jørgen til New York

**Í næstum fara John Johannessen og Jørgen Niclasen sum eygleiðarar við danskari sendinevnd til ST-aðalfundin í New York**





POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Nú stundar til aðalfundin hjá Sameindu Tjóðum, ST.

Sum vant sleppa tveir løgtingslimir við tí donsku sendinevndini. Mannagongdin er tann, at flokkarnir í Løgtinginum skiftast um at senda umboð til New York. Umboðini verða vald innanhýsis í flokkunum, og hesaferð eiga Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin tørn, og teir hava valt ávikavist John Johannessen og Jørgen Niclasen at fara við donsku nevndini.

Føroysku umboðini hava eygleiðarastatus, og kunnu tí ikki seta beinleiðis uppskot fram á fundinum.

John Johannessen sigur við Sosialin, at ætlanin er, at ætlanin er, at hann skal fara til New York tann 18. september, har hann skal vera í tríggjar vikur.

Síðani tekur Jørgen Niclasen yvir í oktobermánaði.

Enn hevur hvør javnaðartingmaðurin ikki fingið skránna fyri sjálvan fundin, men hann væntar, at yvirgangur verður eitt evnunum, sum fer at fylla nógv á dagsskránni teir báðar mánaðirnar, aðalfundurin varar.

Sum Johannessen tekur til, so kann ST-aðalfundurin metast sum eitt slag av skeiði, ið parlamentarikarar fáa høvi til at fara á.

Aðalfundurin er einaferð um árið, og sum nevnt skiftast teir politisku flokkarnir um at senda umboð hagar. Tó sleppa teir smáu flokkarnir ikki at senda umboð eins ofta og teir stóru. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan, at teir somu persónarnir fara á fundin ár um ár.

## – Svimjihylurin átti at verið partur av skúlanum

**Um ein mánaða, tá Tórshavnar býráð hevur havt fund við nólsoyarnevndina, skuldi verið greitt, um kommunan fer at verða við arbeiðinum at byggja svimjihyl í Nólsoy. Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur seg óttast, at um svimjihylurin ikki skjótt verður innilokaður, verður arbeiðið, ið longu er gjørt, burturspilt**



*– Enn kann tað bjargast, men um bíðað verður alt ov leingi, er neyðugt at gera alt umaftur, sigur Heðin Mortensen um tað sum higartil er gjørt av svimjihylinum í Nólsoy.*

NÓLSOY
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hóast Jákup av Skarði, limur í fyrireikingarnevndini fyri svimjihylin í Nólsoy, ikki metir tað vera heppið at fáa Tórshavnar kommunu – sum Nólsoy er partur av – við í arneiðið at byggja svimjihyl í bygdini, so metir Heðin Mortensen, borgarstjóri, at tað er neyðugt at fáa inniloka høllina innan ov langa tíð, tí annars metir hann, at tað arbeiðið, sum longu er gjørt, er burturspilt. Hann sipar til armering o.a., ið sum nú er stendur úti í øllum veðri.

– Enn kann tað bjargast, men um bíðað verður alt ov leingi, er neyðugt at gera alt umaftur, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at hetta ikki er nakað sum býráðið yvirtekur her og nú, men at fundur verður við nólsoyarnevndina í næstum, og tí skuldi verið greitt innan ein mánaða, hvussu leikur fer í hesum máli. Heðin Mortensen sigur, at um kommunan skal vera við í verkætlanini, skal hetta svimjihylurin takast við í næstu fíggjarlóg, og grunnurin, sum arbeiðið við málinum avtakast.

Hann heldur tó, at tað hevði verið skilagott, um kommunan og nevndin í grunninum arbeiddi í felag við at fáa bygt svimjihylin, og at fundir eisini hava verið millum partarnar um málið.

Hann sigur seg tó væl skilja Jákup av Skarði, sum sigur, at nólsoyingar sjálvir vilja byggja sviljihyl, og borgarstjórin kallar hetta "prísverdugt".

Heðin Mortensen sigur, at upprunaliga varð mett, at kostnaðurin fór at liggja um 10 milliónir, men at býararkitekturin er biðin um at koma við eini meting um, hvussu nógv ein svimjihylur fer at kosta.

Heðin Mortensen sigur, at higartil hevur kommunan umvælt skúlan í Nólsoy og bygt barnagarð, og at hann kundi hugsað sær, at svimjihylurin bleiv partur av skúlanum, so næmingarnir í bygdini kundi brúkt svimjihyln í skúlatíðini, og at hann so varð opin fyri almenninginum eftir skúlatíð.